Støðan, 1. deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	HB	2	2 - 0 - 0	8	1	7	6
2	B68	2	1 - 1 - 0	5	2	3	4
3	B36	2	1 - 1 - 0	4	3	1	4
4	VB	2	1 - 0 - 1	1	1	0	3
5	EB/ Streymur	2	1 - 0 - 1	1	1	0	3
6	TB	2	1 - 0 - 1	2	4	-2	3
7	NSÍ	2	1 - 0 - 1	3	6	-3	3
8	GÍ	2	0 - 1 - 1	3	4	-1	1
9	Skála	2	0 - 1 - 1	1	2	-1	1
10	KÍ	2	0 - 0 - 2	3	7	-4	0

Støðan, 2. deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	B71	2	2 - 0 - 0	5	0	5	6
2	ÍF	2	1 - 0 - 1	8	4	4	3
3	FS V	1	1 - 0 - 0	3	0	3	3
4	Sumba	1	1 - 0 - 0	3	2	1	3
5	LÍF	2	1 - 0 - 1	3	3	0	3
6	KÍ	2	1 - 0 - 1	3	8	-5	3
7	B36	1	0 - 1 - 0	2	2	0	1
8	HB	2	0 - 1 - 1	2	4	-2	1
9	VB	1	0 - 0 - 1	2	3	-1	0
10	NSÍ	2	0 - 0 - 2	0	5	-5	0

Danska superligan

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Brøndby	33	20 - 9 - 4	74	28	46	69
2	FCK (M)	33	20 - 9 - 4	62	25	37	69
3	FCM	33	16 - 9 - 8	47	27	20	57
4	AaB	33	16 - 6 -11	52	43	9	54
5	AB	33	13 -11 - 9	48	38	10	50
6	OB	33	13 -10 -10	56	51	5	49
7	Esbjerg	33	13 - 6 -14	42	44	-2	45
8	Viborg	33	10 -11 -12	46	45	1	41
9	Silkeborg	33	8 - 8 -17	41	50	-9	32
10	AGF	33	7 -10 -16	42	56	-14	31
11	Vejle	33	6 -10 -17	38	72	-34	28
12	Lyngby	33	2 - 9 -22	25	92	-67	15

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Todi Jónsson (FCK)

Norska tippeligan

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Lyn	8	7 - 0 - 1	15	8	7	21
2	Molde	8	4 - 2 - 2	14	8	6	14
3	Bodø/Glimt	8	4 - 2 - 2	13	7	6	14
4	Rosenborg (M)	8	4 - 1 - 3	16	10	6	13
5	Odd. Grenl.	8	4 - 1 - 3	11	9	2	13
6	Vålerenga	8	3 - 3 - 2	12	8	4	12
7	Viking	8	3 - 3 - 2	14	11	3	12
8	Stabæk	8	3 - 3 - 2	12	11	1	12
9	Lillestrøm	8	2 - 4 - 2	7	6	1	10
10	Brann	8	3 - 1 - 4	11	14	-3	10
11	Bryne	7	2 - 1 - 4	6	12	-6	7
12	Moss	8	1 - 3 - 4	9	18	-9	6
13	Start	8	0 - 4 - 4	6	13	-7	4
14	Sogndal	7	0 - 2 - 5	7	18	-11	2

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

FCK var meistari í meiri enn ein tíma

Todi skoraði eitt fínt mál í Aalborg, og tað stóð nógv á hjá Brøndby, áðrenn teir fingu tvey mál ímóti Lyngby og harvið vunnu meistaraskapin

DM KAPPINGIN
Jóannes Hansen

33. og síðsta umfarið í superliguni gjørdist meiri spennandi, enn nakar hevði ímyndað sær, at tað skuldi gerast. Oddaliðið Brøndby hevði heimavøll ímóti botnliðnum og langt síðani niðurflutta Lyngby. Einastu kappingarneytarnir hjá Brøndby var gamla meistaraliðið í FCK. Felagið hjá Toda Jónsson hevði torføra uppgávu í Aalborg, har heimaliðið skuldi stríðast fyri at vinna bronsumerkini. Tí var ikki so undarligt, at teir 27.357 áskoðararnir á Brøndby stadion undan kappingarbyrjan og alla tíðina undir dystinum bóru seg at sum um teirra lið longu var meistari.

Brøndby vann 2–0, og harvið staðfestu teir endaligu toppplaseringina, sum teir hava átt øll 33 umførini. Tí kann ikki sigast annað, enn at meistaraheitið var uppiborið.

Men kortini var einki at siga til, at teir í FCK iðraðu seg. Teir taptu onga ferðina eftir vetrarsteðgin, teir høvdu 69 stig – nevyt sama talið sum Brøndby – men teir bláu og gulu gjørdust meistarar, tí málmunurin hjá teimum var átta betri, enn hann var hjá FCK.

Einasta ferðin í øllum kappingarárinum, at Brøndby var aftanfyri FCK var hóskvøldið, meðan dystirnir í síðsta umfarinum vórðu spældir. Í 65 minuttir var FCK á odda ímóti AaB, meðan tað var málleyst í Brøndby. Tá seytjan minuttir vóru farnir í Aalborg, kundu teir 10.689 áskoðararnir staðfesta, at alt bendi á útisigur. Zuma var farin til Suðurafrika at fyrireika seg til HM endaspælið. Ti hevði Peter Møller fingið møguleikan undir liðini á Toda Jónsson, og fyrrverandi AaB spælarin takkaði fyri álitið við at skora tvey mál fyrsta stóra korterið.

AaB royndi at svara aftur, og teir megnaðu undan hvíldini at minka um munin. Men FCK, sum umframt Zuma restaði báðar teir svensku landsliðsspælararnar og norska Mykland, var væl upplagt, sjálvt um teir í síðstu viku mistu gullið í steypakappingini og eisini í landskappingini.

Todi Jónsson var støðug hóttan. Hann hevði fleiri góðar royndir, og lítla løtu eftir steðgin økti hann til 3–1. Eftir at bólturin varð stungin fram ímillum, kom Todi leysur. Um brotsteigarmarkið lat hann bóltin støkka eina ferð í vøllin, áðrenn hann smekkaði til, og tað sang í netinum aftanfyri annars sera væl upplagda Jimmy Nielsen. Harvið hevði Todi Jónsson skorað átta mál í hesum kappingarárinum. Miðverjin Bora Zivkovic átti 4–1 málið.

Faxe kanska til Brøndby

Fyrrverandi meistaravenjarin hjá Jákupi Mikkelsen og Herfølge er kanska á veg til nýggja meistaraliðið Brøndby, sum tey bæði seinastu árini hevur vunnið silvur. Faxe, sum sigst hava sagt nei takk til venjarastarvið hjá føroyska landsliðnum, var í Brøndby hóskvøldið, og hann segði seg hava áhuga at gerast venjari í felagnum, sum hann var við til at vinna so nógv fyri. Michael Laudrup sigst vera eitt annað boð upp á avloysaran hjá Tom Køhlert, sum ikki er áhugaður at halda fram.

Hýrurin í Brøndby var góður hóskvøldið. Stórt fýrverk var fyrireikað og sent eftir dystarenda, men tað stóð leingi nógv á. Lyngby bardist manniliga ímóti stóra mótstøðuliðnum, og teir megnaðu at halda tætt inntil seinna umfarið var tjúgu minuttir gamalt. Heilt inntil í 90. minutti bitu teir negl á Brøndby beinkinum. Tað var ikki fyrrenn í síðsta minuttinum, at Brøndby økti til 2–0 og harvið staðfesti heimasigurin og meistaraskapin.

Molde fýra mál í eitt korter

Eftir at teir hava verið skýrdir at spæla verjukent og keðiligt, blomstraði Molde av álvara í 2.hálvleiki, tá teir vunnu stórsigur á Moss

NOREG
Jóannes Hansen

Jákup Mikkelsen var aftur á beinkinum, tá Molde hóskvøldið á heimavølli vann stórsigur, 5–1, ímóti Moss. Og hesa ferð varð Molde málverjin, Eddie Gustafsson, sannførandi. Moss kom á odda, tá ein hálvur tími var farin, og lítla løtu seinni høvdu teir góðan møguleika at økja um leiðsluna. Men í ein ímóti einum støðum bjargaði málverjin, Molde javnaði undan steðginum, og í 2. hálvleiki var tað bara ein spurningur um, hvussu stórur heimasigurin skuldi verða.

4.817 áskoðarar varð ikki hildið at vera eitt høgt tal. Áskoðararnir vórðu sagdir at halda seg burtur fyri á tann hátt at mótmæla, at heimaliðið ikki hevur spælt serliga áskoðarvinarligan fótbólt í ár. So svaraðu venjarin og spælararnir aftur. Í 2. hálvleiki spældu teir meiri álopskent og sannførandi, enn teir hava gjørt í nøkrum øðrum dysti higartil í hesum kappingarárinum.

Í 16 minuttir skoraðu teir fýra mál. Moss hevði frammanundan staðið seg væl ímóti bæði Lillestrøm og Rosenborg, men nú løgdu teir rygg til stórtap.

Nógv undirhald

Hósdagurin var 16. mai ella dagurin undan tjóðardegnum hjá norðmonnum. Nógvir áskoðarar vóru til fleiri dystir, og teir vóru vitni til fleiri mál, enn tað eru skorað í nøkrum øðrum umfari higartil í ár.

Lyn hevði á tjóðarvøllinum Ullevaal í Oslo vitjan av Bodø/Glimt. Heimaliðið vann 3–1, og harvið eru teir klárt oddalið. Munurin aftur til teir næstu er sjey stig. Hóast kappingin framvegis er rættuliga ung, so eru teir í Noregi longu farnir at tosa um gulldeym í Oslo.

Meistaraliðið seinastu tíggju árini, Rosenborg, hevði heima á Lerkendal í Tróndheimi vitjan av Start frá Kristiansand. Heimaliðið vann 4–2, og tað sóu fleiri enn átjan túsund. Men avrikið varð ikki mett at vera sannførandi. Rosenborg var á odda 2–0 í steðginum. Fyrstu tjúgu minuttirnar av seinna umfarinum skoraði Start tvær ferðir. Kollektiv sovisjúka, segði Rosenborg venjarin Nils Arne Eggen um orsøkina til tað, sum hansara menn stóðu fyri fyrrapartin av seinna umfarinum. Kortini fekk Rosenborg tikið seg saman og vann.

Fleiri enn átjan túsund áskoðarar vóru í Bergen, har Brann hevði vitjan av Bryne. Stóri áhugin mundi komast av, at Brann hevði vunnið tríggjar tær seinastu ferðirnar, men stóra fjøldin fór vónbrotin til hús. Bryne, sum er millum botnliðini, vann 2–1.

Tólv túsund í Stavanger vóru eygnavitni, tá Viking hevði vitjan av Stabæk, og tey vóru heldur ikki serliga væl nøgd. Heimaliðið var frammanfyri 2–0 eftir fyrra umfarið, men tað endaði 3–3. Tá eitt korter var eftir, kom Stabæk framum 3–2, so nógvu heimaáskoðararnir vóru ikki heilt illa nøgd, tí tað eydnaðist í síðstu løtu at fáa javnt.

13.652 áskoðarar sóu Lillestrøm á heimavølli spæla keðiligan 1–1 javnleik ímóti Vålerenga, sum hevur staðið seg væl í ár. Fáir upplagdir málmøguleikar vóru.

Odd Grenland hevði í Skien vitjan av Sogndal. Fyrrverandi føroyska felagið fór til hús við 4–2 tapi. Hetta var fimti ósigurin á rað hjá Sogndal, sum framvegis eigur fyrsta sigurin í hesum kappingarárinum til góða. Tá tað restaði eitt korter, var støðan 2–0 til heimaliðið. Bæði Sogndal málini komu eftir deyðbóltsstøður.

Ruskinnsavnari til IRF í Sandoy

Søkt verður eftir einum ruskinnsavnara til IRF í Sandoy, at byrja mánadagin 1. juli 2002.

Arbeiðið umfatar:
1. Innsavnan av øllum burturkasti frá húsarhaldum, bingjuplássum, virkjum og handlum v.m. í oynni.
2. Rakstur og umsiting fyri IRF av bingjuplássunum í oynni.
3. Rakstur og umsiting av bingjum v.m. hjá IRF í oynni.
4. Rakstur og umsiting av tyrvingarplássinum í oynni.
5. Umframt annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF.

Krøv til umsøkjararnar:
6. Stóra koyrikortið, og vanur at koyra lastbil og brøyt.
7. Kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Lønin verður sett eftir avtalu millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Arbeiðið verður skipað av leiðaranum fyri Meginøkið.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan mánadagin 27. mai 2002 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF, tlf. 443343, Jógvan Júst Olsen.

IRF
Postboks 39
520 Leirvík

Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling.

Hevur hettar áhuga so ring ella skriva til:

P/F Frants Restorff
Tórsgøta 13
Postsmoga 41
110 Tórshavn
Tlf. 311060

frants restorff

Elin Danielsen
Útb. fysioterapeutur
Dr. Jakobsensgøta 22
100 Tórshavn
Tlf. 21 44 77

O2

ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG
HITA · MASSAGU · LINNA

Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan

stephansson hús

hann 86 • 19800

HD - 1. partur í Føroyum

Treytað av nóg stórari luttøku verður í heyst aftur farið undir HD 1. part.
HD 1. partur er ein grundleggjandi ástøðilig innføring í lærugreinirnar vinnubúskap, samfelagsbúskap, hagfrøði, vinnulívsrætt og EDV og búskap.
Fortreyt:
Hægri handilskúla-, Students-, HF- og HT-prógv ella hægri útbúgving.
Eisini skal tann, sum ætlar sær at lesa HD 1. part, hava prógv í støddfrøði á B stig. Til ber eisini at lesa onkra einstaka lærugrein, sum tú kanska hevur brúk fyri í sambandi við arbeiðið.

Undirvíst verður mánakvøld og mikukvøld kl. 15.45 - 19.15. Prógvtøka verður í mai/juni ár 2004.
Luttøkugjaldið er kr. 2.000,00 fyri hvørja lestrarhálvu ella 4.000,00 kr. um árið.
Stakgreinalestur hevur onnur gjøld.

Umsóknarblað fæst á skúlanum. Ringið á skúlan 317177 ella send teldupost sg@hsh.fo
Skrivstovan er opin mánadag - fríggjadag millum kl. 8.00 og 16.00. Eru tygum í iva um okkurt við HD 1. parti ber eisini til at ringja til skúlan. Umsóknarfreistin er **10. juni 2002.**
Møguleiki verður eisini at lesa HD 1. part í Suðuroy, avmarkað pláss.

FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn
Tel 317177, Fax 313374

Tekniski Skúlin í Klaksvík

Undirvísarar

Søkt verður eftir 2 lærarum til Maskindeildina, sum serliga koma at undirvísa lærlingum, SIT-, AT- og HT-næmingum.

Førleiki
Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur yrkisprógv sum maskinsmiðjur. Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur yrkisroyndir og hevur undirvíst.

Setanartreytir
Talan er um føst størv við eftirlønarskipan sambært sáttmála ímillum Føroya Tekniska Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Byrja
Størvini verða sett frá 1. august 2002

Meiri upplýsingar fáast við at venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra.

Umsóknir við prógvum og c.v. skulu sendast skúlanum innan 4. juni 2002.

Tekniski Skúlin í Klaksvík
Postboks 20
Fo-700 Klaksvík

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Lærarar til kommunalu skúlarnar í Tórshavnar kommunu

Skúlastýrini í Tórshavnar kommunu søkja eftir lærarum til kommunalu skúlarnar skúlaárið 2002/2003.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2002/2003, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Til Kaldbaks skúla
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi
1 lærara at undirvísa 7 tímar um vikuna

Til Kollafjarðar skúla
2 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar í farloyvi
1 lærara fyri lærarar, sum hava niðursett tímatal

Til Argja skúla
3 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar í farloyvi

Til Venjingarskúlan
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna
4 lærarar at undirvísa 26,5 fyri lærarar í farloyvi og fyri lærarar, sum hava niðursett tímatal

Til Kommunuskúlan
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna
1 lærara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi
3 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar í farloyvi og fyri lærarar, sum hava niðursett tímatal

Til Sankta Frans skúla
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi
2 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar, sum hava niðursett tímatal
1 lærara at undirvísa umleið 21 tímar um vikuna

Til Eysturskúlan
7 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar í farloyvi og fyri lærarar sum hava niðursett tímatal, harav 1 fyribils starv til 31. desember 2002
1 lærara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi
1 lærara at undirvísa umleið 20 tímar um vikuna

Til Hoyvíkar skúla
7 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærarar í farloyvi og fyri lærarar, sum hava niðursett tímatal

Meiri fæst at vita
um størvini frá skúlastjórunum ella Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 315160.

Umsóknir
til størvini skulu verða Mentamáladeildini hjá Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn **í hendi í seinasta lagi týsdagin 28. mai 2002.** Við umsóknini eiga at verða løgd avrit av prógvbrøvum og møguligum viðmælum.

Skúlastýrini í Tórshavnar kommunu
Mentamáladeildin
SNARSKIVAN

Fólk søkist

Søkt verður eftir lastvognsmekanikara ella manni, ið er vanur at arbeiða uppá lastvognar og bussar, at byrja beinanvegin

SCANIA
Fa. Johs. Berg
Staravegur 1–3
100 Tórshavn
Tlf. 313535